Nýtt

# HITAMET fyri desember

MÁTINGAR: 1. desember 2014 var miðalhitin í sjónum við Oyrargjógv 9,2 stig. Hetta er tað heitasta, sum er mátað við Oyrargjógv og Mykines í desember, 100 ár eftir at mátingarnar byrjaðu í 1914.



**Karin Margretha H. Larsen**
havfrøðingur



**Ebba Mortensen**
verkfrøðingur

Havstovan hevur hitamátarar liggjandi við Oyrargjógv, ið støðugt máta hitan í sjónum. Mátingarnar við Oyrargjógv byrjaðu í 1991, men undan tí vórðu hitamátingar gjørdar dagliga við Mykineshólm í tíðarskeiðnum 1914 - 1969. Av tí at sjógvurin á Landgrunninum er væl blandaður av sjóvarfallinum – serliga í innara partinum – so kunnu vit loyva okkum at siga, at hesar mátingar eru umboðandi fyri hitan á Landgrunninum. Tað vil siga at vit hava eitt mát fyri miðalhitan í sjónum næstan hvønn dag í nærum 80 ár í eitt 101 ára tíðarskeið.

*Talvan vísir ár, dag og hita fyri kaldastu og heitastu mátingarnar í sjónum hvønn mánað.*

| Kaldasti dagligi miðalhiti | | | Mánaður | Heitasti dagligi miðalhiti | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ár | Dagur | Hiti(°C) | | Ár | Dagur | Hiti(°C) |
| 1918 | 13 | 3,0 | Jan. | 1960 | 9 | 8,0 |
| 1935 | 24 | 3,6 | Feb. | 1960 | 9 | 7,5 |
| 1920 | 7 | 3,5 | Mar. | 1959 | 26, 27, 30 | 7,6 |
| 1917 | 1 | 3,7 | Apr. | 2011 | 30 | 7,9 |
| 1917 | 5, 7 | 5,2 | Mai | 1947 | 25, 29, 30 | 10,0 |
| 1952 | 13 | 6,5 | Jun. | 1953<br>2009 | 26<br>30 | 9,9 |
| 1969 | 9 | 7,2 | Jul. | 2009 | 31 | 10,7 |
| 1963 | 2, 6 | 7,7 | Aug. | 1960 | 26 | 11,2 |
| 1929 | 29, 30 | 5,5 | Sep. | 1933 | 10 | 11,5 |
| 1949 | 26 | 6,7 | Okt. | 1959 | 4 | 11,1 |
| 1919 | 26 | 5,8 | Nov. | 2009 | 1 | 10,1 |
| 1917 | 16, 20 | 4,5 | Des. | 2014 | 1 | 9,2 |

Allar teir fyrstu seks dagarnar í desember 2014, var sjógvurin við Oyrargjógv heitari enn gamla metið í 2009




Í talvuni eru hesi tøl bólkað í ávikavist tann kaldasta og tann heitasta dagin í hvørjum mánað. Tann 1. desember var hitamet sett við Oyrargjógv, tá miðalhitin hendan dagin var 9,2 stig. Hetta var væl oman fyri gamla desember-metið, ið var frá 2. og 3. desember 2009, tá miðalhitin báðar dagarnar var 8,9 stig. Allar teir fyrstu seks dagarnar í desember 2014, var sjógvurin við Oyrargjógv heitari enn gamla metið í 2009.

Talvan vísir eisini, at vit hava verið í einum heitum tíðarskeiði í nøkur ár – 5 met av heitasta dagliga hitanum eru sett síðan 2009, meðan onki av metunum fyri kaldasta dagliga hita eru máld við Oyrargjógv – tey eru øll frá tíðarskeiðnum, tá mátað varð við Mykineshólm.